GJALDSTOVAN

# Rammusáttmáli fyri

## trygging av akførum hjá landinum

November 2020

# Innihald


§1. Partarnir ..... 3

§2. Grundarlag ..... 3

§3. Tíðarskeið ..... 3

§4. Sáttmálin fevnir um ..... 4

§5. Treytir og mannagongd ..... 4

§6. Broytingar ..... 4

§7. Endurgjald ..... 5

§8. Force Majeure og týðandi mishald ..... 5

§9. Avhenda til triðja part ..... 5

§10. Trúnaður ..... 5

§11. Træta ..... 5

§12. Undirskrift ..... 6

## §1. Partarnir

**Útbjóðari:**

Gjaldstovan við Keyp Landsins

Kvíggjartún 1

160 Argir

V-tal 343269

Ábyrgdari: Kim Hansen Fulltrúi, kim@gjaldstovan.fo , +298 281581.

**Veitari:**

Betri Trygging

Postsmoga 34

Yviri við Strond 2

110 Tórshavn

V-tal: 537.535

Ábyrgdari: Henry Olsen Vinnukundastjóri, ho@betri.fo, +298 548609

## §2. Grundarlag

Stk. 1. Grundarlagið millum partarnar er rammusáttmálin,

útboðstilfar: "20200918 - Útboðtilfar – akfarstryggingar",

innlatið tilboð: "20201109 - Tilboð Betri - Útgreinatilboð fyri bilar" og

fylgiskjal: 20201117 - Fylgiskjal um tryggingargjald

## §3. Tíðarskeið

Stk. 1. Rammusáttmálin byrjar 1. nov. 2020 endar 31. des. 2022.

Stk. 2. Rammusáttmálin kann nær sum helst sigast upp við 3 mánaðar fráboðanarfreist.

Stk. 3. Útbjóðari kann leingja sáttmálan upp til 1 ár.

## §4. Sáttmálin fevnir um

Stk. 1. Rammusáttmálin fevnir um allar tryggingar, ið eru knýttar at akførum, ið eru fevnd av ábyrgdartrygging sambært ferðslulógini.

Stk. 2. Allir stovnar, ið eru fevndir av "Rundskriv nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum", hava skyldu til at tekna biltryggingar í samsvar við hendan rammusáttmálan.

Skt. 3. Partarnir eru samdir um at samstarva á ein skikkaðan hátt, halda ásetingar í hesum rammusáttmála og uppihalda neyðug krøv fyri virkseminum. Upplýsing um broytingar, sum ávirka einum parti at halda sínar skyldur, skulu fráboðast hinum partinum beinanvegin.

## §5. Treytir og mannagongd

Stk. 1. Útbjóðari bindir seg vegna landi, til bert at tekna tryggingar, fevndar av hesum sáttmála, hjá veitara í sáttmáltíðarskeiðnum. Er veitarin vitandi um tryggingar av akførum, ið ikki eru partur av sáttmálanum, so hevur veitarin skyldu til at boða Útbjóðara frá.

Stk. 2. Veitari bindir seg til at gera alt praktiskt arbeiði, ið er neyðugt, fyri at akfar er tryggja sambært hesum rammusáttmála. Tá stovnur fær nýggjan bil, so skal viðkomandi senda nummarplátuna til veitari, og veitari tekur sær av restini.

Stk 3. Tryggingargjaldið er ásett í fylgiskjal um tryggingargjald.

Stk. 4. Ongan broytingar verða framdar í tryggingargjaldinum so leingi sáttmálin er í gildi. Tó verða gjøldini prístalsviðgjørd, fyrstuferð 31. des. 2021.

Stk. 5. Øll tryggingarskjøl skulu hava høvuðsforfall 1. januar.

Stk 6. Veitari skal á hvørjum ári senda skaðahagtøl fyri akfør knýtt at hesum rammusáttmála. Fyrstu ferð í januar 2022.

Stk. 7. Um veitari móttekur klagu frá stovni, so skal veitari senda skrivliga fráðgreiðing til Útbjóðara innan 5 yrkadagar.

Stk 8. Allar rokningar til tryggingartakararnar skulu vera í formatinum OIO-UBL.

## §6. Broytingar

Stk. 1. Broytingar í rammusáttmálanum skulu fráboðast við rímiligari freist.

## §7. Endurgjald

Stk. 1. Báðir partar hava endurgjaldssábyrgd í fylgi føroyskari lóggávu.

Stk. 2. Um útbjóðari sigur sáttmálan upp vegna mishald frá veitara, so skal veitari dekka tapið hjá útbjóðara.

## §8. Force Majeure og týðandi mishald

Stk. 1. Týðandi mishald verður mett í mun til galdandi praksis og lóggávu. Tó altíð tá talan er um: brot á trúnað, vantandi lýdni í mun til lóggávu, óreiðiligur atburður og brot á sáttmálan, sum eftir eina ávaring ikki verður rættað.

Stk. 2. Partarnir kunnu ikki ábyrgdast fyri mishald orsakað av force majeure.

Stk. 3. Force majeure ger seg galdandi tá tað er ómøguligt at fylgja sáttmálanum orsakað av kríggj, natúrhendinugum, eldi, vekfall, verkbann o.l.

Stk. 4. Partarnir hava pligt til at manna tilbúgving um neyðugt.

Stk. 5. Partarnir bera sjálvir umkostningar av tapi, ið skyldast Force Majeure.

## §9. Avhenda til triðja part

Stk. 1. Partarnir kunnu ikki avhenda nakrar av sínum skyldum sambært sáttmálanum til triðja part, uttan skrivliga góðkenning frá hinum partinum.

Stk. 2. Útbjóðari kann altíð afturvísa triðja part. Sjálvt um viðkomandi uppfyllir skyldurnar í sáttmálanum og útboðstilfar.

## §10. Trúnaður

Stk 1. Úbjóðari er fevndur av "**Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina**".

Stk 2. Partarnir hava tagnaskyldu um viðurskifti, sum partarnir fáa innlit í hjá hvørjum øðrum umvegis samstarvið eftir hesum rammusáttmála, og sum eftir teirra natúr ella lóggávu eiga at vera hildin í trúnaði.

## §11. Træta

Stk. 1. Er talan um trætu, so skal semja sovítt gjørligt søkjast við samráðingum.

Stk. 2. Bera samráðingar ikki á mál, skal trætan loysast endaligt við dómstólarnar.

## §12. Undirskrift

**Útbjóðari**

Torshavn 23. nov 2020
Staður og dato

Underskrift

STJÓRI, LEIF ABRAHAMSEN
Tittul og navn á undirritara

**Veitari**

Tórshavn 3 desember 2020
Staður og dato

Underskrift

VINNUKUNDASTJÓRI HENRY OLSEN
Tittul og navn á undirritara